| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 29. november 2016 |
| Býráðsfundur nr. | 12/2016 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2016 tann 29. november kl. 17.00 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 25. november 2016 um innkalling til fundar.Talan er um nýggja ásetta fundin, við tað at fundurin 24. november 2016 varð avlýstur.

**Møtt vórðu:**
Sonni á Horni
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Gordon M. Petersen
Asbjørn Berthelsen

Gordon M. Petersen møtti sum varalimur fyri Jann N. Toftegaard á lista A, við tað at hann hevði boðað frá forfalli til fundin. Asbjørn Berthelsen møtti sum varalimur fyri Magnus S. Midjord á lista D, sum eisini hevði boðað frá forfalli til fundin.

Við á fundinum luttók eisini Marin S. Thomsen, fíggjarleiðari, meðan mál nr. 72/2016 varð viðgjørt og avgerð tikin.

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, kommunustjóri

**Mál nr. 72/2016.**

**2. viðgerð av uppskoti til fíggjarætlan fyri kommununa fyri 2017**

*Fíggjarnevndin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 21. november 2016 til fyribils fíggjarætlan fyri kommununa fyri ár 2017, har uppskotini frá føstu nevndunum eru tikin við inn í uppskotið.*

Vísandi til grein 39, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri við gildiskomu tann 1. januar 2001, so skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri býráðið. Sambært stk. 2 í somu grein stendur, at kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan 2 ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili, og skal ætlanin verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.

Fíggjarnevndin hevur á fundi 23. november 2016 viðgjørt uppskot til 2. og endaligu viðgerð í býráðnum 29. november 2016, og mælir ein meiriluti í nevndini Eyðun á Lakjuni og Sonni á Horni býráðnum til at góðkenna hjálagda uppskot til fíggjarætlan kommununar fyri 2017.

Nevnast skal, at viðgerð hevur verið í nevndini tann 31. august 2016 í sambandi við uppskoti til 1. viðgerð (karmar) og á býráðsfundi tann 08. september. Eftir býráðsfundin hava nevndirnar viðgjørt uppskot til fíggjarætlan fyri teirra øki, bæði viðvíkjandi rakstri og íløgum, sum løgd vórðu fyri arbeiðsfund býráðsins.

Arbeiðsfundur (temadagur) um fyribils uppskot til fíggjarætlanina fyri 2017, eftir at nevndartilmælini vórðu innkomin, varð hildin tann 15. november 2016.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt uppskoti til fíggjarætlan til 2. viðgerð á fundi 23. november 2016, og byrjaði fundurin kl. 11.30 og vardi til kl. 21.30

Rakstrarútreiðslurnar netto verða mettar til kr. 51.605.806,00 í mun til kr. 51.681.133,00 í 2016 ella ein lækking upp á kr. 75.327,00 ella 0,15% í mun til 2016 og rentuútreiðslur og rentustuðul til kr. 2.280.000,00, avdráttirnir av føstum lánum til kr. 3.000.000,00 og íløgurnar netto kr. 35.370.000,00.

*Talan verður um hesar íløgur netto:*

| | | |
|---|---|---|
| Øki 2. Almanna og heilsumál | kr. | 750.000,00 |
| Øki 3. Børn og ung | kr. | 260.000,00 |
| Øki 4. Undirvísing | kr. | 21.100.000,00 |

| | | |
|---|---|---|
| Øki 5. Mentan og frítíð | kr. | 1.500.000,00 |
| Øki 6. Teknisk mál | kr. | 5.560.000,00 |
| Øki 7. Kommunal virki | kr. | 6.200.000,00 |
| **Samantals:** | **kr.** | **35.370.000,00** |

**Útgreining av íløgunum:**

Íløgur í øki 2 ”Almanna- og heilsumál” kr. 100.000,00 í kommunala tannrøkt, kr. 200.000,00 í Vesturstovu og kr. 450.000,00 í bygging av eldrabýli/landi vm.

Íløgur í øki 3: Børn og ung” kr.260.000,00 eru Stropan og Kamb. Íløgur.

Í øki 4: Undirvísing kr. 21.100.000,00 eru til nýbygging av skúla kr. 21.000.000,00 og kr. 100.000,00 og til undirvísingaramboð. Íløgur í øki 5: Mentan og frítíð eru av settar kr. 1.500.000,00, sum eru kr. 1.000.000,00 til ítróttaranlegg vm. kr. 500.000,00 til uppstigan av Mentanarhúsinum.

Íløgur í øki 6: Teknisk mál kr. 5.560.000,00 eru til nýggjar vegir, kloakkir, útstykkingar, vatnveitingar, lendiskeyp vm., sí íløguskjal. Tó verður roknað við eini grundstykkjasølu upp á kr. 1.200.000,00, so bruttoíløgurnar eru kr. 6.760.000,00.

Íløgur í øki 7 eru kr. 6.200.000,00, soleiðis at íløgur í Fuglafjarðar havn verða kr. kr. 5.450.000,00 sí útgreinan sambærtíløguskjal, við størstu íløgum til keyp av fóðurbryggjuni frá Havsbrún kr. 2,5 mió, asfaltering kr. 1,2 mió., el til bingjur kr. 1,02 og aðrar íløgur kr. 1,28 mió. Íløgur í brunaverkið verða kr. 750.000,00 til keyp av brúktum nýggjari stigabili.

Inntøkurnar av A+B skatti verða mettar til kr. 55.187.806,00 við skattaprosenti 21,5%, skattur av kapitaleftirlønum til kr. 0,00, meðan partafelagsskatturin verður mettur til kr. 15.0 mió. Samlaðu skattainntøkurnar verða sostatt mettar til kr. 70.187.806,00.

Skatturin av eftirlønargjøldum, flytingum vegna DIS/FAS og frádráttum og tíðaravmarkað flyting til rindan av eldraøkinum verða mettar til tilsamans kr. 13.6 mió. móti kr. 14,0 mió. Í 2016. Tíðarmarkaða upphæddin frá landinum verða strokin í 2017.

Samlaðu rakstrarútreiðslurnar á eldraøkinum verða mettar til kr. 16,5 mió. Í brutto, meðan leiguinntøkurnar verða mettar til kr. 700.000,00 ella nettoútreiðsla upp á kr. 15.8, sum er kr. 1,1 mió hægri enn í 2016.

Barnafrádrátturin í kommunuskattinum verður hækkaður við kr. 1.000,00 pr. barn úr kr. 5.500,00 í 2016 upp í kr. 6.500,00 í 2017.

Annars eru kr. 600.000,00 avsettar til skriving, umseting og tilrættalegging av 4 bindum av Fuglafjarðar søgu, soleiðis at útgávan kann verða fingin frá hondini , tá ið kommunan verður 100 ár sum sjálvstøðug kommunu tann 01. august 2018.

Avsetingin til brunaverkið á øki 7 er kr. 900.000,00 til rakstur, móti kr. 1.190.000,00 í 2016 og kr. 80.000,00 til brandstøðina móti kr. 70.000,00 í 2016. Kr. 750.000,00 eru avsettar til keyp av brúktum/nýggjari stigabili undir íløgum. Samlað játtan í 2017 kr. 1.650.000,00 móti kr. 1.280.000,00 í 2016.

Játtanin til rakstur av Mentanarhúsinum er avsett til kr. 1,7 mió í útreiðslum og kr. 0,5 mió í inntøkum ella netto kr. 1,2 mió. Avsetingin í 2016 varð kr. 1,33 mió til rakstur og kr. 0,5 mió í inntøkum ella netto kr. 830.000,00. Talan er sostatt um eina hækking upp á kr. 370.000,00 í mun til 2016.

Nýttar verða kr. 1.500.000,00 av innistandandi peningi til eitt nú íløgur (§25 Gjaldføri) eldraland og skúlabygging, meðan ætlanin er at lána kr. 7,0 mió í sambandi við bygging av nýggjum barnaskúla í 2017.

Við hesi lántøku kemur skuld kommununar í 2017 at vaksa við kr. 4,0 mió. Hesi viðurskifti føra við sær, at mett verður, at lánskuld kommununar netto við árslok 2017 verður umleið 65-70% av eini álíkning við skattaprosenti 23,0%.

Hjálagt verður sent yvirlit yvir metta skuld kommununar pr. 01. november 2016
eins og íløguyvirlit hjá fíggjarnevndini fyri 2017.

Uppskotið frá meirilutanum til fíggjarætlan fyri 2017 javnvigar við ***kr. 115.537.806,00*** við einum avlopi upp á kr. 0,00.

Minnilutin Magnus S. Midjord tekur undir við fyriliggjandi uppskoti frá meirilutanum, tó við teirri broyting, at hann mælir býráðnum til at lækka kommunuskattaprosentið við 0,5%-um, sum mett verður til eina minni inntøku av A+B skatti upp á kr. 1.344.054,00.

Hann mælir til, at henda upphædd kann verða fíggjað við kr. 1,0 mió í meirinntøku av partafelagsskatti (kr. 15,0 + 1,0 mió = kr. 16,0 mió) og kr. 344.054,00 í meirinntøku hjá Fuglafjarðar havn av vørugjøldum. Sí skjal frá fyrisitingini.

Uppskotið hevur sum nevnt verið til 1. viðgerð á býráðsfundi tann 08. september 2016 og varð samtykt at beina tað aftur í fíggjarnevndina til víðari viðgerðar fyri síðan at leggja uppskot fyri býráðið til 2. viðgerð, sum nú við hesum verður gjørt.

Fíggjarætlanaruppskotið hevur sum nevnt frammanfyri verið til viðgerðar í fíggjarnevndini tann 23. november 2016 og verða hervið við tilmæli frá meirilutanum og broytingin frá minnilutanum løgd fyri býráðið tann 29. november 2016 til viðgerðar og samtyktar.

**Avgerð:**
Broytingaruppskot frá Dánjali Vang, um at kr. 150.000,00 verða játtaðar til gongugøtuna millum parkeringsplássið vestan fyri prestagarðin og niðan í Mirmansveg. Talan er um broyingaruppskot til íløgur í øki 6 – teknisk mál. Upphæddin verður fíggjað við niðanfyri standandi lækkan uppskoti frá fíggjarnevndini: Matr. nr. 347 við kr. 20.000,00, Náttúrupark á Kambsdali við kr. 20.000,00, vatnveiting við kr. 40.000,00, Bakkavegur/City við kr. 50.000,00 og vegir á Hellunum við kr. 20.000,00. Broytingaruppskotið varð samtykt. (9-0).

Broytingaruppskot frá Sigurð S. Simonsen um at lækka skattaprosentið 0,5, t.v.s. við kr. 1.344.054,00 og at lækkingin verður fíggjað við meirinntøku av P/F skatti fall. 3 atkv. fyri, 4 atkv. ímóti og 2 atkv. blankar. Fyri atkvøddu Sigurð S. Simonsen, Asbjørn Berthelsen og Dánjal Vang. Ímóti atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Árant Berjastein og Petur Abrahamsen. Blankt atkvøddu Eyðun á Lakjuni og Gordon M. Petersen.

Atkvøtt varð síðan um minnilutatilmæli frá Magnusi S. Midjord fíggjarnevndarlimi. Uppskotið fall. 3 atkv. Fyri, 4 atkv.íÍmóti og 2 atkv. blankar. Fyri atkvøddu Sigurð S. Simonsen, Asbjørn Berthelsen og Dánjal Vang. Ímóti atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Árant Berjastein og Petur Abrahamsen. Blankt atkvøddu Eyðun á Lakjuni og Gordon M. Petersen.

Til seinast varð atkvøtt um meirilutatilmæli frá fíggjarnevndini við samtyktu broytingini, og vórðu uppskotini samtykt. (9-0).

**<u>Mál nr. 73/2017.</u>**

**Mál viðvíkjandi eykajáttan til íløgur í Fuglafjarðar havn.**

Í samband við íløgur í Fuglafjarðar havn fyri 2016 hevur teknisk deild tann 23. november 2016 boðað fíggjarnevndini frá skrivliga, at av samlaðu íløgunum í Fuglafjarðar havn við eykajáttanum upp á kr. 21,7 mió. verða bert nýttar kr. 20,05 mió í 2016.

Hesiu viðurskifti føra við sær, at kr. 1,65 mió kunnu verða fluttar til komandi ár, og tessvegna um neyðugt verða við til at fíggja partvísar íløgur í havnina í fíggjarárinum 2017.

Sambært býráðssamtykt frá 25. februar 2016, so hevur býráðið tikið avgerð um í sambandi við 2. viðgerð av eykajáttanum av íløgum í Fuglafjarðar havn, at kommunan tekur upp samráðingar við P/F J & K Petersen beinanvegin um at útseta gjaldið fyri endaveggin á frystibryggjuni til 2017.

Talan varð um eina upphædd upp á kr. 2,2 mió. Avtala varð gjørd við felagið um hesi viðurskifti, so sambært hesi skal upphæddin verða rindað felagnum í januar/februar 2017, og sotatt krevur eina fíggjarliga avseting komandi fíggjarár undir íløgum í havnina.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 23. november 2016, og mælir nevndin býráðnum hinvegin til at veita eina eykajáttan upp á kr. 550.000,00 til at rinda part av írestandi í rokning frá P/F J. & K. Petersen, upp á kr. 2,2 mió, soleiðis at henda verða endaliga avgreidd í 2016 ístaðin fyri 2017.

Sostatt verður rokningin fíggjað í 2016 við kr. 1,65 mió, sum eru innan fyri verandi avseting upp á kr. 21,7 mió + kr. 550.000,00 í eykajáttan fyri 2016.

Talan verður um eina eykajáttan til rakstrarstað 751 "Íløgur í Fuglafjarðar havn" konto 3142-00, sum hækkað verður við nevndu kr. 550.000,00 upp á kr. 22.050.000,00.

Fíggingin av eykajáttanini verður fingin til vega frá § 25 "Gjaldføri" "Meirinntøku av partafelagsskatti" rakstrarstaði 832 konto 6180-00.

Ein eykajáttan sum henda førir eina útreiðslu við sær, sum hevur beinleiðis ávirkkan á roknskap kommununar fyri 2016.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri við seinni broytingum, og við hvørja eykajáttan skal verðá víst á, hvussu hon skal verða fíggjað.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undeir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð/avgerð á býráðsfundinum 15. desember 2016. (8-1). Fyri atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni, Dánjal Vang, Petur Abrahamsen, Asbjørn Berthelsen og Gordon M. Petersen. Ímóti atkvøddi Árant Berjastein.

**Mál nr. 74/2016.**

**Yvirtøku av Grunninum Kartatoftir.**

Formaðurin í mentamálanevndini Eyðun á Lakjuni hevur verið á fundi við grunnin Karvatoftir tann 04. juli 2016. Á fundinum varð yvirtøkuavtalan gjøgnumgingin, og vórðu smærri broytingar framdar.

Somuleiðis varð avtalað, at "Grunnurin Karvatoftir" skuldi fáa góðkenning frá Fuglafjarðar fornminnisfelag, yvirtøkuroknskapur skuldi verða gjørdur og ognarskapurin til skipið Kyrjasteinur skuldi verða frámeldað Skipaskrásetingini.

Í skrivi frá grunninum til Eyðun á Lakjuni, dagfest 12. August 2016 vísir Jóhan Petersen, formaður grunsins á, at hesi viðurskifti nú eru komin í rættlag.

Mentamálanevndin hevur á fundi tann 7. November 2016 viðgjørt uppskotið frá "Grunninum Karvatoftir" um yvirtøku av Kyrjasteini, og metir nevndin uppskotið frá grunninum vera greitt.

Ein samd mentamálanevnd tekur undir við at yvirtaka "Grunnin Karvatoftir" og harvið eisini Kyrjastein og mælir til, at tilmælið verður lagt fyri fíggjarnevndina og síðan býráðið til endaliga avgerð.

Málið hevur verið til viðgerðar í fíggjarnevndini tann 23. november 2016, og mælir ein samd nevnd býráðnum til at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini um yvirtøku av "Grunninum Karvatoftir" og harvið eisini skipinum Kyrjasteini.

**Avgerð:**
Broytingaruppskot frá Asbjørn Berthelsen, har skotið verður upp, at Fuglafjarðar kommuna ikki yvirtekur Grunnin Karfatoftir – Kyrjastein, men at álagt verður grunninum at beina Kyrjastein burtur innan 2 mánaðar frá ídag at rokna fall. 1 atkv. fyri og 8 atkv. ímóti. Fyri atkvøddi Asbjørn Berthelsen og ímóti atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttr Joensen, Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni, Árant Berjastein, Dánjal Vang, Petur Abrahamsen og Gordon M. Petersen.

Tilmæli frá mentamálanevndini varð samtykt. ( 8-1). Fyri atkvøddu atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttr Joensen, Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni, Árant Berjastein, Dánjal Vang, Petur Abrahamsen og Gordon M. Petersen. Ímóti atkvøddi Asbjørn Berthelsen.

**Mál nr. 75/2016.**

**Viðvíkjandi viðurskiftum um ognina hjá Kaju og Jann Toftegaard við Innandalsveg.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið svarskriv frá Kaju Toftegaard, dagfest 11. oktober 2016 til skriv frá teknisku nevndini, dagfest 22. september 2016 í sambandi við at kommunan hevur gjørt stuðlagarð niðan móti Innandalsvegi oman fyri sethús teirra.

Í skrivinum frá Kaju Toftegaard verður mælt til, at kommunan loysir trupulleikan viðvíkjandi typtum dreni í parkeringsplássinum vestar fyri sethús teirra soleiðis, at parkeringsplássið verður asfalterað.

Víst verður á, at tað vil verða meira umfatandi, trupult og kostnaðarmikið, um tilfarið í parkeringsplássinum verður útskift.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í teknisku nevndini tann 22. november 2016 og mælir ein meiriluti í nevndini Dánjal Vang og Eyðun á Lakjuni býráðnum til, at áheitanin um, at trupulleikin við typtum dreni verður loystur við, at parkeringsplássið verður asfalterað, og at hetta verður endalig loysn á málinum.

Minnilutin Petur Abrahamsen metir ikki, at drenið er typt av tilfari frá økinum omanfyri og mælir býráðnum frá, at umsóknin um at kommunan asfalterar parkeringsplássið ikki verður gingin á møti.

Minnilutin ynskti, at málið varð lagt fyri býráðið, hetta vísandi til § 32 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

**Avgerð:**
Uppskot frá Dánjali Vang um at taka málið av dagskrá fyri opnum hurðum og beina tað til viðgerðar fyri løstum fall. 4 atkv. Fyri, 4 atkv. ímóti og 1 atkv. Blonk. Fyri atkvøddu Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni, Dánjal Vang og Gordon M. Petersen. Ímóti atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Árant Berjastein og Petur Abrahamsen. Blankt atkvøddi Asbjørn Berthelsen.

Broytingaruppskot frá Siggu Óladóttir Joensen um at fáa ein óheftan metingarmann at kanna økið fyri at vita, um økið er typt, og um tað er kommunan, ið hevur volt trupulleikan, fall. 4 atkv. Fyri, 4 atkv. Ímóti og 1 atkv. Blonk. Fyri atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Árant Berjastein og Asbjørn Berthelsen. Ímóti atkvøddu Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni, Dánjal Vang og Gordon M. Petersen. Blankt atkvøddi Petur Abrahamsen.

Atkvøtt varð síðan um minnilutauppskotið frá Peturi Abrahamsen í teknisku nevndini og fall uppskotið. 4 atkv.fyri, 4 atkv. ímóti og 1 atkv. blonk. . Fyri atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Árant Berjastein og Petur Abrahamsen. Ímóti atkvøddu Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni, Dánjal Vang og Gordon M. Petersen. Blankt atkvøddi Asbjørn Berthelsen.

At enda varð atkvøtt um meirilutauppskotið frá teknisku nevndini. Uppskotið fall. 4 atkv. fyri, 4 atkv. ímóti og 1 atkv. blonk. Fyri atkvøddu Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni, Dánjal Vang og Gordon M. Petersen. Ímóti atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Árant Berjastein og Petur Abrahamsen.Asbjørn Berthelsen atkvøddi blankt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 21.10.

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Árant Berjastein

Gordon M. Petersen

Asbjørn Berthelsen

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen